Klivin um klettar, brýnd inn á bein
brostin til jarðar, stokkin til himmals
Fann teg við ánna krógvaði teg fyri tíðini
Sjáldan sá eg vakrari andlitsbrá

"Ein dropi er einki uttan trúnna á havið"
letur í ánní sum veksur í vavi

"havið er einki uttan trúnna á dropan"
teskar dýpið sum rísur úr kavi

Vit bresta til jarðar og støkka til himmals

Druknaður við sjóvarmála í endaleysum sjónarmála
ein strála við brúnna endur vinnur trúnn

Vit bresta til jarðar og støkka til himmals
tað fløðir og fjarðar

tráan eftir svørum seyrar í hyljar,
rennur í vøtn, samlast í kørum
har vit vilja baða sum børn

Vit bresta til jarðar og støkka til himmals
tað fløðir og fjarðar minni og minni

Vit bresta til jarðar, vit støkka til himmals
Til jarðar vit bresta, til himmals vit støkka
Vit bresta, vit støkka, til jarðar, til himmals

Lyftini vit góvu tey reisa seg á tindunum vit stóðu
Tárini vit fulla fækkaðust við árunum
og fullu til jarðar turr av elli
og nú spíra liljur upp úr hellu

Orðini vit gloymdu í skundinum
tá heimurin gekk undan
liva enn í trúnni og nú sæst
ein strála undan brúnni

Í eina løtu síggja vit heimin í litum
í eini vøku sveima vit í smáum bitum

Um eina løtu hóma vit tað djúpa gapi
í eini vøku blóma vit í nýggjum skapi

Í eini vøku sleppa vit tí sum er liði
í eina løtu hvíla vit í tøkk og friði

Dottin úr skýggjum, borin av nýggjum
Sjáldan sá vakrari andlitsbrá

Brostin til jarðar, stokkin upp frá
Sjáldan sá vakrari brá

ENGLISH
Climbed over boulders, ground to the bone
crashed to the ground, sprung to the sky
found you by the river hiding from time
seldom saw a more beautiful brow

”a droplet is nothing without faith in the Ocean”
says the river as it’s growing

”the ocean is nothing without faith in the Droplet”
whispers the deep as it’s rising

We crash to the ground and spring to the sky

Drowned by the shore in endless sight
a ray on the verge in the horizon

We crash to the ground and spring to the sky
the tide rises and falls

The yearning for answers seeps into ponds
runs into lakes which as children we longed
to bathe in

We crash to the ground and bounce to the sky
the tide rises and falls less and less
We crash to the ground and bounce to the sky
To ground we crash, to sky we bounce
We crash, we bounce, to ground, to sky

The promises we gave they arise
on every peak we ever stood upon
The tears we shed decreased with the years and fell
to the ground, dry from age
and now lilies sprout from the rubble

The words we forgot in our haste,
as the world took off
still alive in the belief
a wistful ray appears in the horizon

For a short while we see the world in colours
awake we float around in tiny pieces

In a while we’ll glimpse the deep chasm
and awake we bloom in a new shape

Awake we let go of what has passed
for a while we rest in thankfulness
and peace

Fallen from the clouds, born again
seldom saw a visage more lovely

Crashed to the ground, sprung up
seldom saw such a beautiful brow